# Prestar hava eisini talufrælsi

**Prestar hava sama rætt at siga sína meining sum onnur. Hetta staðfestir Hans Jacob Joensen, bispur, sum ikki hevur nakra viðmerking til orðini hjá Ólavi Rasmussen um, at ein uppgerð er neyðug í Fólkakirkjuni**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



Í blaðnum í gjár var drúgv samrøða við Ólav Rasmussen, hvalbiarprest, har hann í rættiliga bersøgnum orðingum segði sína meining um ymisk viðurskifti í føroyska samfelagnum. M.a segði hann hetta um Fólkakirkjuna:

"-Tað var O.K. Olofson, sum byrjaði hetta nýreligiøsa rákið í Fólkakirkjuni. Tú sært serliga hetta rák rundan um Miðflokkin og nýggju prestarnar í dag. Hetta rák er við at drena næstrakærleikan úr kristindóminum. Eg eri bangin fyri, at teir sokallaðu modernaðu prestarnir við sínum miðaldarsjónarmiðum fara at oyðileggja og knúsa Fólkakirkjuna og kristindómin. Fólkakirkjan má taka uppgerðina við hesi trongdskygdu sjónarmið, tí tað kann føra til ørskap um vit skulu fortelja hvørjum øðrum, hvør er verdur til at kalla seg kristnan".

Greinin er eftir øllum at døma nógv lisin, tí í morgun lá hon ovast á listanum yvir mest lisnar greinir á Internetsosialinum, og onkur áheitan er komin til redaktiónina, har spurt verður um, hvørja støðu Hans Jacob Joensen, bispur, hevur til orðini hjá Ólavi Rasmussen.

### Rúmlig kirkja

Bispur hevur tó onga viðmerkingar til samrøðuna við hvalbiarprest, tí sum hann sigur, so hava prestar eins og øll onnur talu- og skrivifrælsi við ábyrgd.

Bispur sigur, at hann er eftirlitismyndugleiki í Fólkakirkjuni í Føroyum. Hetta inniber, at hann skal hava eftirlit við, at prestarnir røkja sítt embæti væl, og teir boða tann kristna boðskapin soleiðis, at hann er í samsvari við ta luthersku læruna og trúarjáttan Fólkakirkjunnar.

Hvat teir annars gera í privatum ella politiskum virksemi, kann bispur illa hava eftirlit, sigur Hans Jacob Joensen.

Til samanberingar kann nevnast, at stutt fyri jól prædikaðu 200 prestar í donsku fólkakirkjuni – sum tann føroyska kirkjan er partur av – ímóti flóttafólkapolitikkinum hjá donsku stjórnini. Hetta valdu teir 10 bisparnir í Danmark at lata fara aftur við borðinum.

Hinvegin valdi politiski framsøgumaðurin hjá stjórnarflokkinum Vinstra, Jens Rohde, at siga sín limaskap í kirkjuni upp, men hetta varð ikki væl fagnað á Kristiansborg. M.a. helt kirkjumálaráðharrin, Bertel Haarder, sum eisini er limur í Vinstra og ósamdur við teimum 200 prestunum, at prestar skulu hava loyvi til at siga sína meining, og tí skulu teir ikki fáa munnkurv.

---

Mogens Tilsted Christensen:

# Eg havi ikki gjørt mismun

**Hvalvíkarprestur er rættiliga varin í sínum útsøgnum í Ekstra Bladet, sum hevur tosað við hann í sambandi við lesarabrævið, hann hevði í bløðunum fyri jól**

SAMKYND
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Undir yvirskriftini »BØSSE-BALLADE – HOMOFILE VEDERSTYGGELIGE: Dansk præst på Færøerne meldt til politiet for hetz« hevur danska Ekstra Bladet eina samrøðu við Mogens Tilsted Christensen í mánadagsútgávuni.

### Eg eri ikki so forferdiligur

Í samrøðuni við Ekstra Bladet sigur Mogens Tilsted Christensen, at hann ikki er so forferdiligur, sum onkur heldur, men kennir seg misskiltan av teimum, ið meldaðu hann. Men prestur er varin í sínum útsøgnum – kanska tí at revsilógin í Danmark er øðrvísi.

### Í andsøgn við lesarabrævið

Í samrøðu við danska blaðið sigur prestur, at hann heldur, at samkynd í veruleikanum kunnu vera lærarar, men at onkur bara hevur misskilt lesarabrævið. Men so lætt sleppur hann ikki, tá blaðmaðurin vísir á, at prestur skrivar, at tað er »en naturlig



diskvalifisering« fyri ein lærara at vera samkyndur, og blaðmaðurin spyr, um tað kann skiljast á annan hátt?

### Til hetta sigur hvalvíkarprestur:

»...Altså hvis en ansøger til en stilling som pædagog, lærer eller præst enten er homofil eller pædofil eller har sådan nogle ting, og der er andre ansøgere, så mener jeg, at vedkommende skal fravælges. Det handler om andre folks børn, og Biblen fortæller at homoseksualitet er en synd.«

### Prestar og pyromanar

Prestur vil vera við, eins og hann hevur ført fram í føroyskum miðlum, at hann ikki hevur samanborið samkynd við pedofil. Men verður spurdur av tíðindamanninum um, hvussu hann hevði uppfatað tað, um tíðindamaðurin skrivaði, at tú ikki eigur at lata prestar og pyromanar sleppa inn í hoyggjhús.

Hesum svarar Tilsted Christensen, at hann hevði ynskt, at tíðindamaðurin lat vera við at siga tað. Men at hann ikki hevði ætlað at samanborið samkynd við pedofil. Prestur vísir á, at hann ikki hevur gjørt mismum á nøkrum, men einans hevur sagt síni sjónarmið um hetta mál.

---

# Bill staðfesti, hvat er list – og ikki

**Listamaðurin Ole Wich hevur rættiliga sett dagsskránna hesa vikuna við sínum homoFObia-myndum. Hann hevur verið avmyndaður á tvinnum forsíðum og luttikið í einum sjónvarpskjaki. Bill Justinussen heldur tó ikki, at myndirnar hjá Ole Wich kunnu kallast list**

LISTAKJAK
*Theodor E. D. Olsen*

Kjakið um myndirnar hjá Ole Wich er rættiliga kyknað hesa vikuna, og ikki kann sigast annað enn, at myndirnar honum við Merkinum við undirheitinum "homoFObia" hava givið afturljóð. Mánakvøldið høvdu bæði Dimmalætting og Sosialurin gjørt av at seta myndir av Ole Wich og hansara verkum á forsíðuna, og eisini eru aftursvar komin úr tí politska umhvørvinum.

Bill Justinussen, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, hevur bæði í lesarabrævi og práti við Sosialin funnist at verkunum hjá Ole Wich, og hann hevur eisini sagt, at sjálvur metir hann ikki, at homoFObia-átakið kann kallast list. Í kjakinum í SvF týskvøldið helt Bill Justinussen fram við at útgreina hesi sjónarmið við m.a. at siga, at sambært honum kundu t.d. málningar hjá Ingálvi av Reyni kallast list, meðan myndirnar Ole Wich ikki kundu kallast list, tí so kundi ein og hvør kalla seg listafólk.

### Hvør avger, hvat er list?

Sosialurin royndi fyrrapartin at fáa eina viðmerking úr tí føroyska listaumhvørvinum til útsagnirnar hjá Bill Justinussen, og hvørjar avleiðingar tað kann fáa fyri eitt fólkaræði, um politikarar skulu allýsa, hvat list er, men hetta eydnaðist ikki. Forkvinnan í Listafólkasambandi Føroya, LISA, var ikki at hitta, og aðrir limir í nevndini í LISA vildu ikki gera viðmerkingar. Heldur ikki formaðurin í felagnum Føroysk Myndlistafólk var at hitta, og tað vóru ymiskir listaummælarar heldur ikki.

Sosialurin skilir tó, at útsagnirnar hjá løgtingsmanninum úr Miðflokkinum hava vakt ans millum føroysk listafólk, og at spurningurin um at politikarar úttala seg um, hvat er list og ikki, verður viðgjørdur í løtuni.